# Gunnar Mikkelsen syngur í Føroyum

**Næsta vikuskiftið fer hálvføroyski vinnarin av kappingini Stjørna í eitt kvøld at syngja til tiltøk á Platform og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Tað kom eitt sindur óvæntað á fólk bæði í Danmark og í Føroyum, tá ið Gunnar Mikkelsen vann sangkappingina Stjørna í eitt kvøld í fjør.

Aðrir sangarar vóru greiðir favorittar í finaluni, men Gunnar, ið hevur føroyska mammu, snýtti øll og streyk avstað við sigrinum í kappingini. Hann gjørdi harvið føroysku Guðrun kynstrið eftir.

Tað varð sagt, at tað vóru serligu ungu kvinnurnar, sum høvdu tokka til sangaran, og tær vóru ídnar at atkvøða við sms. Í øllum førum kundi Gunnar smílandi staðfesta, at hann hevði vunnið, og at tað hevði við sær plátuútgávu hjá felagnum Universal.



*Nú kemur Gunnar Mikkelsen til Føroya at syngja. Hetta er fyrstu ferð, at hann syngur í Føroyum, síðani hann vann sangkappingina Stjørna í eitt kvøld*

**Syngur nýggjar sangir**
Útgávan er ikki komin enn, men Gunnar tekur sær ikki av løttum fyri tað.

Næsta vikuskiftið kemur hann til Føroya at hava framførslur, og tað verða fyrstu framførslurnar hjá honum, eftir at hann vann donsku kappingina. Hann fer at syngja sangir, sum verða á útgávuni hjá sær, og man hann ikki eisini fara at tríva í vinnarasangin.

Gunnar fer at syngja á dansistaðnum Platform í Havn fríggjakvøldið 5. mars, og síðani gongur leiðin til Fuglafirðar, har hann fer á pallin í Mentanarhúsinum leygarkvøldið 6. mars.

Tað verða føroyskir tónleikarar, sum fara at spæla undir hjá Gunnari. Kim Hansen, Johannus á Rógvi Joensen, James Olsen og Jens Marni Hansen fara at taka sær av ljóðførunum, og harvið fær Gunnar eitt trygt grundarlag undir sínum framførslum.

WWW.SMYRIL-LINE.COM

púra vitleyst...
Summartilboð

2 vaksin og 2 børn við bili
1 vika í Danland-íbúð

DANLAND er vorðið eitt hitt best umtókta ferðamálið hjá føroyingum. Danland frítíðardeplarnir hava vælinnrættaðar íbúðir við køki og nógv frítíðartilboð eru fyri bæði vaksin og børn.

Danland úr 7.950,-[1]
Íroknað er: Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku fyri 2 vaksin og 2 børn við bili.

2 vaksin og 2 børn við bili
1 vika á Pers Hotel

Pers Hotel úr 6.890,-[2]
Íroknað kostnaðin: Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost, fyri 2 vaksin og 2 børn.

2 vaksin og 2 børn við bili
1 vika á Skallerup Klit

SKALLERUP KLIT FERIECENTER er stórur nútímans frítíðardepil av høgari góðsku, ið er við strondina millum Blokhus og Hirtshals. Har er subtropiskt baðiland, bóndagarður, ítrivshallir og alskyns uttandura hentleikar.

Skallerup Klit úr 9.400,-[1]
Íroknað er: Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku á Skallerup Klit Feriecenter fyri 2 vaksin og 2 børn við bili.

Í risa stuttleikaparkini 40 km úr París møtir tú kendu teknisøgufigurunum »live«.
2 vaksin og 2 børn við bili
Ferðin yvir øllum ferðum
1 vika í Disneylandi í París

Disneyland úr 18.500,-[3]
Íroknað er: Ferð fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil uppihald 5 nætur á Hotel Santa Fe í Disneylandi á dupultkamari við 2 uppreiðingum og uppihald 1 nátt á hotelli á út- og heimferðini.

2 vaksin og 2 børn við bili
1 vika í DanCenter summarhúsi

Summarhús úr 7.780,-[1]
Íroknað er: Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili.

2 vaksin og 2 børn við bili
Summarhús í Hetlandi

Hetland úr 6.980,-[2]
Íroknað er: Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili.

1 vika á Hotelli í Íslandi
Fyri hvønn ferðandi

Ísland úr 4.108,-[3]
Íroknað er: Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í dupultkamari við wc/bað á Foss-hotelli í 7 nætur.

1) Fráferð: 7/5, 14/5, 21/5, 28/5, 4/6, 11/6, 13/8, 20/8, 27/8 og 3/9. Aðrir prísir eru galdandi um fráferðin ikki er ein av nevndu døgum.
2) Fráferð: 3/5, 10/5, 17/5, 24/5, 31/5, 7/6, 9/8, 16/8, 23/8 og 30/8. Aðrir prísir eru galdandi um fráferðin ikki er ein av nevndu døgum.
3) Nevnda prísdømi er galdandi fyri lágárstíð. Aðrir prísir eru galdandi um ferðast verður uttanfyri lágárstíð.

SMYRIL LINE
J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

# Tórshavn Radio komið undir Fiskimálaráðið

SAMSKIFTI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Seinasta mikudag skrivaðu Føroya Tele og Fiskimálaráðið undir avtaluna at flyta raksturin av Tórshavn Radio frá Føroya Tele til Fiskimálaráðið frá 1. mars at rokna.

Sum partur av hesi tilgongd hava starvsfólk hjá Føroya Tele, ið høvdu sítt dagsliga starv á Tórshavn Radio, í samráð við Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, fingið møguleikan at halda fram við at arbeiða á Tórshavn Radio, men undir nýggju leiðsluni á Sjóbjargingarstøðini.

Tað var tann 1. februar í 2002, at málsøkið neyð og trygd varð yvirtikið sum føroyskt sermál. Radiogrundað neyð- og trygdartænastan á havinum, ella Tórshavn Radio, sum vit vanliga kalla tað, var partur av hesum málsøkið, sum nú varð lagt til Vinnumálaráðið, sum aftur gav Føroya Tele Tórshavn Radio at umsita vegna Vinnumálaráðið.

Fiskimálaráðið hevur síðani yvirtøkuna rikið Sjóbjargingarstøðina, og hevur tað síðani yvirtøkuna verið politiskt ynski um at kanna møguleikarnar at leggja málsøkið og raksturin av Tórshavn Radio undir Fiskimálaráðið, sum ein natúrligur partur av málsøkinum neyð og trygd.

31. januar 2002 varð ein arbeiðsbólkur settur at kanna og gera tilmæli um samstarv ella samanlegging av Sjóbjargingarstøðini og Tórshavn Radio.

21. februar sama ár kom arbeiðsbólkurin við einum ávegis tilmæli um samstarv og framtíðar samstarvs ella samanleggingarmøguleikar millum Sjóbjargingarstøðina og Tórshavn Radio. Seinni kom eitt endaligt tilmæli, og avgjørt var at taka til eftirtektar leistar og mannagongdir, ið lýstar vóru í teimum báðum tilmælunum.



# Nýggj leiðsla í Havnar Handverksmeistarafelag

**Í farnu viku hevði Havnar Handverksmeistarafelag aðalfund, og á fundinum takkaði formaðurin seinastu mongu árini, Vilhelm M. Johannesen, fyri seg. Nýggjur formaður í felagnum er Magnus Magnussen**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

**Magnus nýggjur formaður**
Nevndin hevur skipað seg við Magnusi Magnussen sum formanni. Jón Danielsen er næstformaður, Mouritz Mohr er skrivari, meðan Sjúrður Holm og Pauli Hofgaard eru nevndarlimir.

Á aðalfundinum hjá Havnar Handverksmeistarafelag stóðu tveir av nevndarlimunum fyri vali. Umframt sjálvan formannin, Vilhelm M. Johannesen, stóð eisini Tummas Sørensen fyri vali, og báðir boðaðu aðalfundinum frá, at teir tóku ikki við afturvali. Í teirra stað vóru valdir Jón Danielsen og Pauli Hofgaard.



# Ársroknskapurin merktur av burturleggingum

TÍÐINDASKRIV

Umfatandi kreppan í alivinnuni ber í sær, at ársroknskapurin hjá Føroya Sparikassa fyri 2003 er merktur av burturleggingum móti møguligum tapum av skuldarum. Roknskapurin prógvar tó eisini, at Sparikassin er ein sterk fyritøka í framgongd, og útlit eru fyri, at 2004 gerst eitt gott sparikassaár.

Føroya Sparikassi almannakunnger í dag ársroknskapin fyri 2003. Roknskapurin er merktur av burturleggingum, fyrst og fremst móti møguligum tapum í kreppuraktu alivinnuni.

Ársroknskapurin vísir m.a., at Sparikassin hevur avskrivað og burturlagt 309,2 mió. kr. Tað merkir, at úrslitið eftir skatt gjørdist eitt hall upp á 128,8 mió. kr. móti einum avlopi árið fyri upp á 65,9 mió. kr.

"Sparikassin sannar, at úrslitið fyri 2003 er ikki nøktandi. ILA og metlágir laksaprísir hava noytt alivinnuna í knæ, og tað er høvuðsorsøkin til úrslitið", sigur stjórnin í Føroya Sparikassa.

Stjórnin vísir hinvegin á, at roknskapurin eisini er eitt greitt tekin um, at Sparikassin er ein sterk fyritøka í framgongd. Grundraksturin hevur ongantíð verið so góður sum í 2003, tí inntøkurnar eru nógv øktar, meðan útreiðslurnar at kalla standa í stað.

"Saman við teirri sannroynd, at vágin í alivinnuni fer at minka í ár, gevur tann góði grundraksturin ábending um, at úrslitið fyri 2004 verður betri enn í 2002", sigur stjórnin.

Nettorentuinntøkur og ómaksgjøld gjørdust heilar 237,1 mió. kr., ið er ein øking uppá 9,6% ella 20,6 mió. kr. í mun til árið fyri. Kursvinningurin av virðisbrøvum og gjaldoyra gjørdist 23,1 mió. kr., sum er 11,4 mió. kr. betri enn í 2002. Sostatt gjørdist úrslitið av fíggjarpostum heilar 269,0 mió. kr. – ein vøkstur uppá 33,1 mió. kr. í mun til 2002, tá talið var 235,9 mió. kr.

Rakstrarútreiðslurnar gjørdust 121,4 mió. kr., sum er ein øking uppá 2,7% ella 3,2 mió. kr. í mun til árið fyri.

Fíggjarstøðan javnvigaði við 5,195 mia. kr. við árslok 2003, ið er á sama støði sum árið fyri. Bæði útlán og innlán minkaðu í 2003. Útlánini minkaðu 2,3% niður í 3,887 mia. kr. við árslok 2003. Innlánini minkaðu 4,1% niður í 3,786 mia. kr.

Eginpeningurin var 753,6 mió. kr. við árslok 2003. Solvensurin var 19,1% móti teimum lógarkravdu 8,0%.

Politistur

**Eitt arbeiði við avbjóðingum**

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur verða hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet - ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðing fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

**Eitt arbeiði allan sólarringin**

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.
Her er eitt gott samhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum.
Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum - um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí.
Atlitið til borgaran og samfelagið er alla tíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar



**Løn og útbúgving**

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum.
Royndartíðin er umleið 3 ár. Aftaná tað fært tú - um tú ert egnaður til politiarbeiði - fast starv sum politistur.

**Menning og karriera**

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politið hevur eina røð av serskeiðum - og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



**Ynskir tú at vera við?**

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelagnum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði - og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

**Føroya Landfúti**
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Postsmoga 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 1448 fax. 35 1449
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. 3 politistar skulu setast heystið 2004.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 15.03.2004